# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Kunnu vit ikki semjast um, at palestinar fáa egið sjálvstøðugt ríki, eru dagar Ísraels skjótt taldir*

*(Ehud Olmert, forsætisráðharri)*

# - Har var einki livandi




*Bjargingarliðini funnu vrakið 12 kilometrar frá flogvøllinum í Isparta*

*(Mynd: Polfoto)*

**Tey 56, sum vóru við rutuflogfarinum úr Istanbul til Isparta í morgun, komu ikki vegin fram. 12 kilometrar frá flogvøllinum datt flogfarið niður**

- Bjargingarliðini hava funnið vrakið, og har var einki livandi.

Tað vóru tey stuttu boðini, sum stjórin í Atlasjet, Tuncay Doganer, hevði til tíðindafólkini, sum vóru komin at frætta, hvat var hent rutuflogfarinum og teimum, sum við vóru. Boðini frá stjóranum vóru, at øll tey 49 ferðafólkini og manningin, sum taldi sjey, høvdu latið lív.

Turkiska flogeftirlitið sigur, at flogfarið hvarv av radaranum hjá flogvøllinum í Isparta, stutt áðrenn tað skuldi seta seg. Tá hevði flogskiparin biðið um lendingarloyvi, men so hoyrdist ikki meiri frá flogfarinum.

Nógv fólk vóru komin á flogvøllin í Isparta at taka ímóti fólki, sum vóru við flogfarinum, og fleiri teirra máttu fáa sálarliga hjálp, tá tað fréttist, at flogfarið var dottið niður. Tað sama var í floghavnini í Istanbul, haðani vanlukkuflogfarið var farið.

Felagið Atlasjet, sum átti flogfarið, sigur, at flogfarið var í góðum standi, og at tað vóru ikki tekniskir trupulleikar, sum elvdu til vanlukkuna. Turkiski samferðsluráðharrin segði fyrrapartin, at vanlukkan skal kannast gjølla.







## STUTT SAGT

### Fundur um ísbjarnir

Norska stjórnin hevur nú tikið stig til ein fund, sum skal viðgera støðuna hjá ísbjarnunum, nú veðurlagsbroytingarnar hótta við at taka lívsgrundarlagið undan bjarnunum. Fundurin verður í Tromsø á vári í 2009, og har verða umboð úr teimum fimm londunum, sum hava ísbjarnir. Tey eru Noreg, Russland, USA, Kanada og Danmark, sum í hesum førinum umboðar Grønland. Norska stjórnin vísir á, at ísbjarnirnar ferðast um landa- og sjómørk, og tí mugu londini finna eina felags støðu til møgulig verndartiltøk.

### Val aftur útsett í Libanon

Herfyri varð forsetavalið í Libanon útsett til í dag, men í gjár boðaði tingformaðurin frá, at valið kann heldur ikki vera í dag, og at tað fyribils er útsett til tann 7. desembur. Libanon hevur ikki havt nakran forseta síðani seinasta fríggjadag, tá Emile Lahoud fór frá, tí hansara valskeið var liðugt tá. Ætlanin er at velja ein forseta, sum er sinnaður at skerja sýrisku ávirkanina á libanskan politikk, men higartil hava flokkarnir ikki funnið nakran, sum teir kunnu semjast um. Summir eygleiðarar hava sagt, at ósemjan kann enda við borgarakríggi, men politikararnir royna at sissa fólkið og siga, at teir fara at finna eina neyðsemju um forsetaembætið.

### Viagra er gott valagn

Í Teilandi hava myndugleikarnir hert reglurnar fyri, hvat flokkar og einstaklingar kunnu loyva sær at brúka fyri at tekkjast veljarunum í einum valstríði. Men herdar reglur hava vanliga við sær, at ferð kemur á hugflogið, og soleiðis er eisini í hesum sambandi. Í hvussu er siga talsmenn hjá landsins størsta flokki, PPP, at valevni hjá einum øðrum flokki bjóða eldri monnum viagratablettir aftur fyri teirra atkvøður. Ein talsmaður hjá tí skuldsetta flokkinum viðgongur, at teir hava givið eldrimonnum viagra-tablettir, og sjálvur dugir hann ikki at síggja nakað skeivt í, at flokkurin hjálpir teimum eldru.